

Spildurnýggi risapallurin Deepsea Aberdeen, sum BP hevur leigað í sjey ár til at menna oljuframleiðsluna eystan fyri føroyska markið. Hann er serútgjørdur at bora á djúpum vatni á Atlantsmótinum.

# Risapallur skal menna oljuleiðirnar nær føroyska markið

Deil:

**Jan Müller**

07.11.2014 - 09:35

Oljan.fo

Um somu tíð sum óvissa hevur tikið seg upp um oljuleitingina á føroyska landgrunninum, er talan um beint ta øvugtu gongdina hinumegin markið, á bretska landgrunninum. Har er verulig gongd á. Bretski oljurisin BP, sum longu stendur fyri trimum framleiðandi oljukeldum vestan fyri Hetland, Foinaven, Schiehallion og Clair, hevur gjørt avtalu við norska felagið Oddfjell um leigu av nýggjasta og einum tí størsta boripallinum í heiminum, Deepsea Aberdeen, sum skal bora eystan fyri føroyska markið komandi sjey árini. BP er í

løtuni í ferð við at byggja út risastóru Clair oljukelduna í fleiri støðum. Talan er um útbyggingar í hundrað milliarda klassanum. Clair keldan er mett at goyma 7 mia. tunnur av olju ella uppaftur meira.

Í løtuni verður næsta framleiðandi feltið á Clair kelduni bygt út, og í vikuni boðar BP so aftur frá, at tað helst fer at lata upp fyri trimum framleiðandi feltum aftrat á Clair í framtíðini.

Beint nú verður Clair Ridge bygt út til at fara undir framleiðslu í 2017. Nýggju útbyggingarnar eftir Clair Ridge, sum higartil verða nevndar Greater Clair, eru komnar á tekniborðið, tó at tað enn er "very early days". BP borar í løtuni sætta avmarkingarbrunnin í hesum økinum.

BP hevur so stórar vónir til Clair, at tað hevur leigað ein nýggjan boripall í eitt sjey ára tíðarskeið. Hesin er Deepsea Aberdeen, sum júst er latin eigarunum, norska felagnum Oddfjell. Tað var hann, sum koppaði í Suðurkorea nakað herfyri.Hann er serútgjørdur til at kunna borað á djúpum vatni, upp til 3000 metrar og í økjum við sera ringum veðri.

Nú hann er klárur, verður hann flaggpallurin hjá bretska oljurisanum, sum ætlar at gera økið vestan fyri Hetland til eitt av sínum stóru kjarnuøkjum nógvu komandi árini. Og fyri føroyingar eigur hetta eisini at hava áhuga, tí keldurnar, sum BP umsitur og byggir út, liggja ikki so langt frá føroyskum øki. Tær kunnu so seta tankar í gongd her heima eisini um møguleikarnar at finna olju á føroyska landgrunninum einaferð í framtíðini.

Clair keldan varð funnin í 1978, men fyrsta framleiðslan kom ikki fyrr enn í 2004. Tað skuldu ganga 25 ár frá tí, at keldan varð funnin, til fyrsta oljan kom upp. Seinkingin kemst av, at tøknin varð ikki tøk til at fara eftir henni tá. Nú tykist keldan so mikið áhugaverd, at BP komandi árini kann fara at bora upp til 80 brunnar í sambandi við ætlanina at vaksa um sína framleiðslu.

Aftrat hesum kemur, at felagið eisini ger risastórar útbyggingar av hinum feltinum, Schiehallion, har eitt spildurnýtt framleiðsluskip, FPSO skal avloysa verandi skip. Haraftrat verða gjørdar stórar útbyggingar á havbotninum. Eisini her er talan um íløgur í 100 milliarda flokki.

Alt hetta hendir um somu tíð, sum oljufeløg hava borað brunnar á føroyska landgrunninum uttan at havt hepni við sær. Men keldur oljan.fo hevur tosað við siga, at føroyingar eiga avgjørt ikki at missa vónina at finna oljuna, tí neyvan er so nógv olja hinumegin markið og eingin hesumegin.

Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum segði nú um dagarnar við Útvarpið, at hann var sannførdur um, at olja fanst í føroysku undirgrundini, nú hon var at finna allan vegin hinumegin markið. Hetta var sami boðskapur, sum fremstu leitistjórar hjá OMV høvdu at siga føroyska oljuportalinum, tá hann vitaði á høvuðsskrivstovuni hjá felagnum í Wien.

Stóru útbyggingarnar hjá BP eru so heldur ikki tær einastu vestan fyri Hetland ella eystan fyri Føroyar. Total og Dong eru í ferð við stórar útbyggingar av gassleiðunum, og nú um

dagarnar gjørdist greitt, at fleiri smærri gasskeldur eisini verða bygdar út og bundnar í ta stóru gassleiðingina, sum skjótt verður tikin í brúk vestan fyri Hetland.

Og fara vit enn nærri føroyska markinum, so eru eisini her stórar útbyggingarætlanir, sum enn mangla endaligt grønt ljós. Chevron og OMV eru í ferð við at endurmeta útbygging av Rosebank kelduni. Nakað herfyri gjørdi Chevron av at útseta avgerðina at byggja kelduna út, men síðani hevur OMV, sum nú eigur størsta partin av kelduni, gjørt av at halda fram við endaligu metingunum við tí fyri eygað at byggja kelduna út. Tá verður hon næsta oljukeldan hjá Føroyum, bert fáar kilometrar frá markinum.Ein nýggjur pallur verður eisini bygdur í fjareysturi, sum nettupp eins og BP pallurin, skal brúkast á okkara leiðum, tvs. í sambandi við útbygging av Rosebank. Tað fekk oljan.fo at vita, tá vitjað varð á básinum hjá Chevron á oljumessuni í Stavanger í august.

Og oljuprátið hinumegin markið er ikki av á hesum sinni heldur. Tí eitt sindur longri syðri liggur leitimiðið Blackrock – miðskeiðis millum Rosebank og Cambo keldurnar, bert stutt frá føroyska markinum. Har fara OMV og Dong at bora næsta ár. Miðjað verður móti at finna so nógvar oljukeldur í hesum økinum, at tær kunnu gera eina útbygging av stóru keldunum, Rosebank og Cambo lønandi. Her verður arbeitt við eini ætlan at gera ein sokallaðan "Hub", ein miðdepil, har tú hevur eina høvuðsútbygging og so knýtir fleiri smærri keldur uppí.

Aftrat hesum útbyggingum verða aðrar keldur bygdar út vestan fyri Hetland, eitt nú Lancaster og Solan har suðuri. Neyvan hava vit hoyrt seinasta orðið um oljumenning eystan fyri føroyska markið.


